# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Maria Johannesen**, vanliga nevnd Mia, av Skála, ættað av Toftum, andaðist á Eysturoyar røktar- og ellisheimi týsdagin 24. juni 97 ára gomul. Farið verður av Røktarheiminum hóskvøldið kl. 19 í Skála kirkju. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Miu kunnu lata eina peningagávu til Skála kirkju konta í peningastovninum.

**Hanna Davidson**, fødd Olsen, ættað úr Leirvík, búsitandi í Lysekil í Svøríki, andaðist mánadagin, 82 ára gomul.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Maria Johannesen**
vanliga nevnd Mia av Skála,
ættað av Toftum

andaðist á Eysturoyar Ellis- og røktarheimi, týsdagin 24. juni, 97 ára gomul.
Farið verður av Røktarheiminum hóskvøldið kl. 19.00 í Skála kirkju.
Jarðarferðin verður fríggjadagin kl 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sonja og Petur Jacob**

Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata eina gávu til Skála kirkju, konta í peningastovninum.

# Áhugaverd framsýning í Smiðjuni



Í døgunum 27. juni til 2. juli hava tær tríggjar: Silja Strøm, Ingilín D. Strøm og Gyðja Hjalmarsdóttir framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Silja er júst liðug við sítt fyrsta ár á The Glasgow School of Art. Nakað av tí, hon hevur abreitt við í farna ári, er at síggja á framsýningini. Tekningar, grafikkur (etsingar) analogt fotoprent og olja á pappír.

Ingilín hevur, við sínum 16 árum, ikki tær stóru royndirnar, men hon hevur longu í nógv ár fotograferað. Hon hevur gott eyga fyri myndevnum og fangar tey á sín serstaka hátt.

Gyðja er mamma tær báðar. Sjálv kallar hon seg ein glaðan amatør, og tað er jú í grundini ikki so galið. Gyðja hevur akrylmálningar við á framsýningini.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 27. juni kl. 15. Opið verður allar dagar kl. 14 – 19.

Fyri 30 árum síðan:

# Lærarabrógv í 1978



Í 1978 fingu 22 lærarar prógv á Føroya Læraraskúla.

**Málslig deild:** Hanus Bærentsen, Jean Dimon, Julia Hansen, Charlotta Jensen, Terje Kjærbo, Karolina Kristensen, Kristian Midjord, Hjørleif Poulsen og Elin Sørensen.

**Náttúrufrøðislig deild:** Torkil Dahl, Dagbjartur Debes, Sjúrður Guttesen, Bjarni Heinesen, Ásla Huusgaard, Annika Højgaard, Bjørgheðin Jacobsen, Henrik Jacobsen, Kjartan Kristiansen, Ingvard Lamhauge, Edvin Lauritsen, Edvard Olsen og Símun Sivertsen. (Raðfylgjan er tilvildarlig).

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1978*

**Dagurin**
**27. juni. Sjey sovarar**. Halgisøgan sigur frá, at tá ið keisarin Decius legði eftir teimum kristnu, leitaðu sjey ungir menn sær skjól í einum helli í fjøllunum. Hellið, teir krógvaðu seg í, varð funnið, og stórir steinar settir fyri inngongdina, so at teir skuldu svølta í hel. 200 ella 300 ár seinni vórðu steinarnir tilvild veltir frá munnanum, og teir sjey vaknaðu við sítt fríska lív uttan at vita, hvussu leingi teir høvdu sovið.